# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Costa Rica var til reiðar

**Hóast styrkismunurin á pappírinum var lítil, so fekk Føroyska talvlandsliðið ikki eitt bein til jørðina í dystinum móti Costa Rica**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jóan Hendrik Andreasen hevur havt eina fína kapping, og aftur í gjár vann hann stig til føroyska liðið*

Mynd: www.faroechess.com

Eftir styrkismetingini at døma, vóru møguleikar fyri einum góðum úrsliti. At Føroyar fyri seks árum síðani vunnu á Costa Rica, gjørdi ikki vónirnar hjá føroyska liðnum verri, men veruleikin var kaldur hjá talvlandsliðnum í gjár.

Tað gekk nevnliga als ikki eftir vild, og føroyska liðið tapti greitt 3-1 í dystinum, sum annars skuldi lyfta okkum á talvuni.

Helgi Dam Ziska og Heini Olsen mannaðu tey bæði fremstu borðini hjá okkum, og í báðum førum gjørdist talan um tap.

Og tó at Martin Poulsen og Jóan Hendrik Andreasen á teimum báðum næstu borðunum ikki høvdu stórvegis trupulleikar við at fáa remis, so hjálpti hetta ikki tað heilt stóra í samlaða úrslitinum.

Eftir umfarið í gjár eru Føroyar akkurát í miðjuni á stigatalvuni við 14 stigum fyri 7 dystir, og tað svarar akkurát til tey 50%, ið mest sum hvørja ferð eru málið hjá føroyska liðnum. Og við støðuni sum nummar 72 av teimum 154 tjóðunum samsvarar støðan eisini neyvt við styrkismetingina undan kappingini.

Í dag er mótstøðuliðið Suður Afrika, sum er nummar 71 við somu úrtøku sum Føroyar. Føroyar eru tó styrkismettar eitt vet hægri.

## Ongland vann á Týsklandi

Ongland og landsliðsvenjarin, Fabio Capello halda góðu gongdini. Ongland vann 2-1 á Týsklandi á Olympiska Leikvøllinum í týska høvuðsstaðnum, Berlin. Tá 24 minuttir vóru spældir helt týski málverjin, Rene Adler ikki bóltunum, og Matthew Upson varð skjótur at gagnýta støðuna, og leggja Ongland framum 1-0. Talan var um fyrsta landsliðsmálið hjá Upson.

Tíðliga í 2. hálvleiki høvdu enski málverjin, Scott Carson og John Terry stórar samskiftistrupulleikar. Endin gjørdist, at Patrick Helmes tók bóltin fram við málverjanum og skoraði í tóma málið til 1-1.

John Terry gjørdi tó skaðan góðan aftur. Stutt fyri leiklok sendi Stuart Downing eitt gott fríspark inn í brotsteigin hjá Týsklandi. John Terry stútaði bóltin hegnisliga í handara hornið, og hóast Carson og Terry enn eina ferð samskiftistrupulleikar, men ta ferðina kostaði tað ikki, og Ongland vann altso dystin 2-1.

**-heris**

# Skandinaviskur niðurtúrur

**Danmark, Noreg og Svøríki taptu. Ísland vann á Malta**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Craig Bellamy, sum her dystast við Per Krøldrup, oyðilegði danska fótbóltskvøldið, tá hann skoraði einsamalla málið í Brøndby í gjárkvøldið*

Mynd: Polfoto/AP

Danski landsliðsvenjarin hevði vónað, at danska landsliðið kundi halda góðu gongdini ímóti Wales í kvøld. Persónliga hevur Morten Olsen ongantíð tapt, sum landsliðsvenjari í november mánað. Men alt hetta oyðilegði Craig Bellamy hjá Wales í 77. minutti, tá hann gjørdist matchvinnari. Bert 10.271 áskoðarar vóru til dystin í Brøndby, og tey sóu eitt walisiskt útilið, sum hevði aðrar málmøguleikar eisini. Danmark lá eisini framvið, tað nærmasta danir komu, varð eitt skot hjá Søren Larsen ímóti dystarenda, sum rakti stongina.

Fyri fyrstu ferð síðani 1978, er eitt landsliðsár farið aftur um uttan, at Noreg hevur vunnið ein landsdyst. Noreg spældi á útivølli ímóti Ukraina, og endaði dysturin 1-0 til Ukraina. Sigursmálið skoraði Seleznov uppá brotsspark í 26. minutti. Åge Hareide umbar seg við teimum mongu skaðunum, sum hava rakt norska liðið.

Svenski landsliðsvenjarin, Lars Lagerbäck kundi bert rósa hollendsku mótstøðumonnunum, sum sýndu vakurt spæl, tá Holland vann 3-1 á Svøríki. Báðumegin steðgin skoraði Robin van Persie fyri heimaliðið til 1-0 og 2-0. Kim Källström fekk Svøríki inn aftur í dystin, men Dirk Kuyt staðfesti sigurin hjá Hollandi. Lagerbäck varð greiður - Vit møttu einum liði, sum var betri enn vit.

Ísland spældi niðri á Malta, og har eydnaðist tað íslendingum at tryggja sær ein sigur. Hálvleiksstøðan varð 0-0, men tá 66 minuttir vóru spældir tryggjaði Heiðar Helguson Íslandi sigurin. Íslendingar høvdu teir flestu málmøguleikarnir, sum vóru í dystinum.

## Dreymabyrjan hjá Maradona

Diego Maradona fekk eina dreymabyrjan, sum argentinskur landsliðsvenjari, tá Argentina vann 1-0 á Hampden Park í Skotlandi. Sigursmálið fall longu eftir átta minuttum, tá Maxi Rodriguez í góðum samstarvi við Carlos Tevez og Jonas Gutierrez hegnisliga skoraði til 1-0. Skotland hevði í løtum stórar trupulleikar við at fylgja leikferðini hjá Argentina. Skotar gjørdu eisini verjuvillir, sum vóru nær við at geva fleiri mál til Argentina. Ígjøgnum allan dystin hevði Skotland stórar trupulleikar við at spæla seg gjøgnum argentinsku verjuna. Tað varð ein ovurfegin Diego Maradona, sum kundi práta við fjølmiðlarnar, aftaná eitt sannførandi avrik hjá Argentina.

**-heris**